# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Grønlendskur sorgarleikur

Søgan í útvarpinum hjá KVF í gjár um grønlendsku børnini, sum vórðu flutt til Danmarkar, er einki minni enn ein sorgarleikur. Eftir at Danmark í 1953 hevði innlimað Grønland í kongaríkið, vóru nógvar royndir gjørdar til tess at nútímansgera Grønland og á ymsan hátt at flyta hjálandið tøkniliga og samfelagsliga fram á sama støði sum sjálvt Danmark. Nógvar av hesum royndum vóru bæði marghháttligar og illa umhugsaðar.

Ráðandi danir vóru upptiknir av grønlendska málinum og hildu, at hetta var ein forðing fyri tí tøkniligu menning, sum skuldi til, um Grønland skuldu kunna nútímansgerast. Teir mettu tað sum eina óvikiliga fortreyt, at grønlendingar lærdu danskt eins væl og danir, og tóku teir tí til mong løgin ráð til tess at røkka hesum máli.

Tey mest marghháttligu ráðini vóru at flyta ein hóp av grønlendskum børnum til Danmarkar, har tey skuldu fáa danska uppaling, ogna sær danskt mál og danska mentan fyri sum vaksin at venda heimaftur og vera við til at byggja eitt nýtt nútímans Grønland. Tað er tíverri ymiskt, sum bendir á, at foreldrini at hesum mongu børnum ikki av fríum vilja lótu børnini frá sær. Børnini vórðu flutt til Danmarkar og latin til fosturs i donskum valaheimum, men nógv bendir á, at henda undarliga og etiskt sera ivasama roynd ikki var grønlendsku børnunum at gagni. Tey saknaðu, sum øll børn uttan mun til uppruna, foreldur og heimland, og mongum teirra gekst ikki væl í lívinum. Nøkur endaðu á donskum barnaheimum, og í mongum førum gingu ár, áðrenn nøkur teirra sóu foreldur og føðiland aftur og uppaftur onnur komu ongantíð aftur til foreldur og heimland.

Tað, sum hendi við hesum børnum, er enn ein dimmur blettur á donsku hjálandasøguni í Grønlandi. Henda søga er frammanundan alt annað enn tespilig. Heilt frá døgum Hans Egedes og fram til sekstiárini royndi dansk-norska hjálandaveldið at noyða europeiska mentan inn á upprunligu grønlendsku tjóðina, og gekk hesin politikkur fyrst og fremst út yvir grønlendska málið ella rættari sagt grønlendsku málini, tí har eru ikki minni enn tvey móðurmál - eitt fyri vestan og eitt fyri eystan.

Tað var ikki fyri enn grønlendska sjálvstýrisrørslan við Jonathan Motsfelt, Lars Emil Johansen og Moses Olsen á odda kom fyri seg, at vend kom í hesa skeivu gongd. Síðan hevur bert gingið framá, og tað fegnast øll um – ikki minst flestu danir, tíbetur.

Almenna Danmark skyldar burturfluttu donsku børnunum, teirra familjum og allari grønlendsku tjóðini eina treytaleysa umbering fyri hesa misgerð. Hartil er ikki órímligt, at børnini og familjurnar fáa fíggjarligt endurgjald fyri hetta, sum var teimum fyri. Um danska stjórnin ikki skjótast tekur sær um reiggj, eigur Norðuratlantsbókurin á Fólkatingi at reisa málið á røttum staði.

**Sosialurin**

## Vón fyri tryggari og nútímans farleið um Nólsoyarfjørð



**JÁKUP AV SKARÐI**
f. arbeiðsbólkin at byggja nýggja Ritu

Tað er at frøðast um, at Johan Dahl, landstýrismaður, ber boð, at farið verður undir at byggja nýggja ferju til Nólsoyar - og at peningur er tøkur. Ein millión varð nýtt til projektering í fjør og sigast kann at talan er um óføra góða tekning, ið løgd varð fyri nólsoyingar á almennum fundi. Tá ið talan nú er um pakka við 100 milliónum, og ferjan bert kostar góða helvt, eru lunnar lagdir fyri at fara í gongd 1. januar 2010 - um leitað veðrur eftir tilboðum nú, heldur enn at bíða.

Sjálvsagt hava fólk hug at stúra fyri tíðini Ternan verður sett í sigling - serliga tá talan er um vetrartíðina - men tá ið Johan Dahl, landsstýrismaður, í øðrum skrivi leggur fram at, talan er um fyribilsloysn, samstundis sum nýggj ferja verður bygd, so kunnu nólsoyingar og tey ferðandi til Nólsoyar nokk klára seg við hesum í ein vetur.

Í tíðarskeiðinum, arbeiðsbólkurin hevur fingist við hetta álvarsmál, hevur talan verið um, at 18 mánaðir eru nóg mikið til projektering, útbjóðan og bygging. Tískil er tað við gleði, at vit lesa bløðini og vita, at tá ið nú projekteringin er fingið frá hondini, er talan bert um at bjóða út og byggja skipið - her hava vit frætt, at talan er um einar 8-10 mánaðir. Við hesum í huga er fyribilsloysnin av sonnum fyribilsloysn og ikki yvir fleiri ár, ið fryktandi var.

Tí er tað við vón um nýggja ferju, at arbeiðsbólkurin takkar Jóhan Dahl, landsstýrismanni, fyri útsagnirnar í vikuni og sjálvsagt við vón um, at øll tingfólkini taka undir við, at farið verður undir at byggja nýggja ferju til farleiðina um Nólsoyarfjørð. Vísa landsins kosnu menn og kvinnur, at gerðir eru aftan fyri jaligu útsagnirnar, so er møguleiki fyri at nýbygd ferja røkir farleiðina um Nólsoyarfjørð til ovastevnu komandi ár - tað hevði verið gleðiligt.

Vit í arbeiðsbólkinum gleðast sjálvsagt mest um nýggju ferjuna til Nólsoyar. Tá ið hetta samstundis hevur við sær bata norðanfyri, og kanska Ternan kann nýtast sum eykaskip fyri Teistan og Smyril, ljóðar tað sum upp aftur betri heildarloysn. Verður nýggja ferjan tøk í august 2010, so er ikki neyðugt at seta avloysaraskip inn til Nólsoyar.

Í hesum tíðum við uppsagnum, hevði tað sjálvsagt verið framúr, um føroysku veitararnir halda seg framat ferjubyggingini. Harafturat er vónin um, at vit einaferð kunnu skifta frá vanligum motori til vetnis-motor sjálvsagdur »síðu-vinningur«, ið eigur at tæna samfelagnum øllum.

Við bestu ynskjum um góða arbeiðsgongd.

## Thierry Henry torir ikki til Føroya



**SJÚRÐUR SKAALE**

**Men tað er ikki landsliðið, hann ræðist. Tað er flogvøllin!**

Fleiri hava undrast á, at ein spillfrískur Thierry Henry ikki kemur við franska landsliðnum til Føroya.

Men tað er ikki so løgið. Seinast hann var her og spældi, var túrurin ræðuligur. Ikki bara fyri Henry, men eisini fyri umdømið Føroya.

At endurgeva seg sjálvan virkar ofta býttisligt, men eg fari at loyva mær at endurprenta ein stubba, eg hevði í bløðunum beint eftir tann dystin. Tað var tann 22. oktober 2007 undir yvirskriftini:

**»Thierry Henry kemur so ikki aftur til Føroya...«:**

»Eurosport sendi um vikuskifti eina sending um EM-undankappingina.

Myndirnar av dystinum móti Fraklandi vóru vístar og kommenteraðar.

Tað er tað, tað er. Í ítrótti gongur upp og niður.

Men so var ein mynd av Thierry Henry við ein sjónvarpsskíggja. Sjónvarpsstøðin vildi vísa honum, hvussu tað sá út, tá franska landsliðið lendi á Vágum. Tá hann sær tær ræðandi myndirnar av flogfarinum, ið setir seg sum ein veingjaskerdur fuglur, tekur hann hendurnar upp fyri andlitið. “Og so var tað einans fyri ein fótbóltsdyst”, sigur hann – skelkaður av, at teir skuldu hava váðað so nógv.

Kanska var ikki vandi á ferð í veruleikanum.

Men at fáa fronsku stjørnurnar og ein hala av tíðindafólki til Føroya, kundi verið gott fyri ferðavinnuna. Men boðskapurin, sum milliónir av Eurosport-hyggjarum fingu frá sjálvum Thierry Henry um vikuskiftið var, at tað er skít etandi farligt at fara til Føroya!

Stórir tónleikabólkar mugu bíða í dagar. Bill Clinton slapp akkurát niður. Franskir landsliðsleikarar halda seg hava verið í lívsvanda. Og hetta eru bara nøkur heilt sjónlig dømi. Eingin veit, hvussu nógv tað kostar okkum í mistum inntøkum, at flogvallarviðurskiftini eru, sum tey eru.

Men vit vita, at hetta er okkum dýrt. Bæði so og so. Tað átti ikki at verið so ringt at samst um, hvør okkara næsta, stóra samferðsluíløga skal vera!«

**Eingin vilji**

Síðani er ein samtykt gjørd á tingi um at kanna, hvar ein nýggjur flogvøllur liggur best.

Men tað eru bara pengarnir, sum vísa veruliga politiska viljan. Og hann er ikki til staðar. Í staðin er nú ætlanin at gera aðrar, stórar íløgur í samferðslu. Íløgur, sum tilsamans kosta nærum tað sama sum ein flogvøllur...


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Elleby Andersen alvin@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]



**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.


**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.